Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Skannarin til Klaksvíkar Sjúkrahús

Spurningur:

1. Frá hvørjum sjúkrahúsum eru limirnir í arbeiðsbólkinum, sum skal gera tilmæli um gávuna, sum Klaksvíkar Sjúkrahús fekk frá gevarum í Klaksvík og Eysturoynni?

Viðmerkingar:
Undirritaða setti tann 4. mai landsstýrismanninum í heilsumálum 6 spurningar í samband við skannaran, sum Klaksvíkar Sjúkrahús fekk í gávu frá gevarum í Klaksvík og Eysturoynni.

Spurningur 1 var:
Ætlar landsstýrismaðurin at seta ein arbeiðsbólk at gera tilmæli í samband við stórfingnu gávuna, Tesla MR-skannaran, ið Klaksvíkar Sjúkrahús hevur fingið?

Spurningur 2 var:
Um ja, hvør verður settur í hendan arbeiðsbólkin, sum skal gera tilmæli. Frá hvørjum sjúkrahúsi og hvørji deild verða tey?

Landsstýrismaðurin svaraði tann 17. mai 2023 spurningi 1 og 2 undir einum. Svarið var soljóðandi:

Sjúkrahúsleiðslan hevur sett ein arbeiðsbólk, sum skal gera eitt fakligt tilmæli til leiðsluna í Sjúkrahúsverkinum um skannaran. Varastjórarnir á Landssjúkrahúsinum og á Klaksvíkar Sjúkrahúsi eru í arbeiðsbólkinum, saman við fakfólki innan medicoteknisk tól, radiologi, røntgen, medicinskar sjúkur og fíggjarviðurskifti.

Arbeiðsbólkurin leitar sær eisini vitan hjá øðrum viðkomandi fakfólkum fyri at svara arbeiðssetninginum. Eitt nú hevur bólkurin fingið íkast frá serlækna innan mammakirurgi, serlækna í urologi, serkønum uttanlands, sum arbeiða við MR-skanningum, umframt framleiðara av 3 Tesla MR-skannara.

Eg eri ikki nøgd við svarið, tí landsstýrismaðurin svarar ikki rættiliga uppá spurning 2. Svarað verður ikki uppá, hvørjum sjúkrahúsi og hvørji deild fólkini í arbeiðsbólkinum koma frá. Eg ynski at fáa at vita, hvørjum sjúkrahúsi fakfólkini í arbeiðsbólkinum koma frá.

Tað er sera løgið, um so er, at fakfólk, fíggjarfólk, radiografar og læknar á Klaksvíkar Sjúkrahúsi ikki eru við í arbeiðsbólkinum, sum skal gera tilmæli. Vónandi er tað ikki so.

Fyri at fáa eitt meira nágreiniligt svar uppá spurningin settan 4. mai, verður hesin spurningur settur.

Á Løgtingi, 19. mai 2023

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur